Maiken vann ferðaseðlarnar

VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin um frostmarkið. Út á seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind ella skrið av landsynningi og vátakavi, seinni regn. Hitin kemur upp í eini 6 stig.



Veðrið hósdagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, um kvøldið hækkar hann upp í útnyrðing . Ælingur, sum frálíður vátakavi. Hitin um dagin millum 4 og 7 stig – um kvøldið niður móti frostmarkinum.



Veðrið fríggjadagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og regn, seinnapartin upp í skrið av útsynningi og ælingur. Hitin millum 3 og 6 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men hann minkar vindin út á dagin og yvirhøvur turt. Sunnudagin veksur hann vindin aftur upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Hitin millum 4 og 8 stig.



Maiken Joensen í Havn var hepni vinnarin í Sudokuðkappingini, og vann hon tveir ferðaseðlar

Mynd: Jens Kristian Vang

Steintóra Joensen úr Vági, sum er í starvsvenjing á Sosialinum, dróg vinningin í Sudoku-kappingini

Mynd: Jens Kristian Vang

SUDOKU-KAPPING
Steintóra Joensen

Hepni vinnarin av sudokukappingini hesaferð og harvið tveimum flogferðaseðlum við Atlantic Airways, var funnin í dag.

Vinnarin gjørdist Maiken Joensen úr Havn.

Hon sigur, at hon og maðurin plaga at loysa saman, og hava tey sent inn til hvørja kapping síðan kappingin byrjaði, fyri gott einum ári síðan.

Tá Maiken verður spurd, um hon hevur umhugsað hvat hon ætlar at brúka ferðaseðlarnar til, sigur hon, at leiðin gongur møguliga niður til Danmarkar, men einki er avgjørt enn.

Vit ynskja Maiken tillukku við vinninginum.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-11
Nuuk	5
Qaqortoq	1
Ammassalik	4
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	7
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	7
Lerwick	6
Aberdeen	-1
London	5
Tromsø	--
Bergen	6
Oslo	--
Stokkhólm	4
Keypmannah.	6
Helsinki	0
Moskva	2
Berlin	2
Warzawa	0
Kiev	0
Bukarest	-2
Paris	0
Madrid	9
Róm	13
Malorca	16
Athen	8
Malta	16
Tunis	16
Beijing	0
New Dehli	17
Bangkok	31
Jakarta	--
Sydney	--
New York	6
Miami	16
Los Angeles	15
Meksikobýur	15
Panama	--
La Paz	13
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	28

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt djúpt lágtrýst, 957 hPa. í landsynning úr Føroyum fer skjótt í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 988 hPa. í útsynning úr Írlandi fer í landnyrðing.



Í dag:
Lágtrýstið yvir Skagerrak hvørvur eystureftir. Eitt djúpt lágtrýst í landsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing eystan og brúgvalagið haðani verður við Føroyar mikukvøldið.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 2/1 kl. 06^{00}– 3/1. 06^{00}. Hitin í gjár: 10,2°
Minsti hiti í gjár: 1,4° - Mesti hiti máldur í januar: -°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,0 mm – mált frá 2/1 kl. 06^{00}– 3/1 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í januar: 3,0 mm

VESTFALLSKYRRINDI

3. januar	Fullmáni/Jørðin næst sólini
10. januar	Mánin longst frá jørðini
11. januar	Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
9. Jan	10.51	23.09	09.51	22.09	10.06	22.24	00.32	12.51	01.32	13.51	09.06	21.24	08.06	20.24	11.06	23.24	-	12.06	10.36	22.54	11.51	-
10. Jan	11.27	23.58	10.27	22.58	10.42	23.13	01.09	13.27	02.09	14.27	09.42	22.13	08.42	21.13	11.42	-	00.24	12.42	11.12	23.43	00.09	12.27
11. Jan	-	12.29	11.29	-	11.44	-	01.58	14.29	02.58	15.29	10.44	23.15	09.44	22.15	00.13	12.44	01.13	13.44	-	12.14	00.58	13.29
12. Jan	01.00	13.32	00.00	12.32	00.15	12.47	03.00	15.32	04.00	16.32	11.47	-	10.47	23.06	01.15	13.47	02.15	14.47	00.45	13.17	02.00	14.32
13. Jan	01.51	14.11	00.51	13.11	01.06	13.26	03.51	16.11	04.51	17.11	00.06	12.26	11.26	23.47	02.06	14.26	03.06	15.26	01.36	13.56	02.51	15.11

Lesið Sosialin -tað loysir seg

Sosialurin